# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HANN IÐ LÆR SÍÐST LÆR BEST

Hann gjørdi eitt ordans hál, Leo kongur, sum Dimmalætting skírir hann, í nýggjastu veljarakanningini, ið Gallup hevur gjørt fyri blaðið.

Slíkar veljarakanningar eru altíð áhugaverdar, tó at fólk altíð kappast um at siga, at tær skulu takast við fyrivarni. Sjálvandi skulu kanningar takast við fyrivarni, tí tær eru kanningar og ikki valúrslit.

Men latið okkum kortini dvølja við hesi tølini, sum um tey vóru galdandi: Hetta merkir, at Kaj Leo Johannesen fær trý fólk afturat sær – og styrkir samgonguna tilsvarandi. Fólkaflokkurin gongur eitt vet fram, meðan tað framvegis gongur sera illa hjá Javnaðarflokkinum at vinna fólksins tokka aftur. Fyri 20 árum síðani vann Javnaðarflokkurin stórt. Tá mynstraði flokkurin samgongu saman við Fólkaflokkinum – tann fyrsta tveyflokka samgongan síðani 1954 – men hetta gjørdi enda á flokkinum sum ráðandi flokkurin í Føroyum. Undir nýggjari leiðslu í 1994 fór flokkurin í knús, tá fakfelagsleiðarar fóru í opið kríggj við flokkin. Sama veg fór Tjóðveldisflokkurin eisini, men í 1998 megnaðu nýggju tjóðveldisfólkini at vinna flokkin fram á fremstu rók – meðan Javnaðarflokkurin hevur ilt við at sleppa undan at teljast millum teir tríggjar smæstu flokkarnar.

Sambært kanningini ber aftur til at mynstra eina tveyflokka samgongu – og enntá eina »samríkissamgongu«, um Javnaðarflokkurin aftur vil leggja seg á tann bógvin. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava ongantíð havt meiriluta á tingi síðani heimastýrislógina – og fyri fyrstu ferð síðani fullveldishugtakið kom inn í politikkin í 1998, klára fullveldisflokkarnir ikki at mynstra meiriluta.

Vit kunnu so leggja tað í tað, sum vit vilja – men veruleikin er kortini tann, at meðan aðrir floksleiðarar læa eftir og háa Kaj Leo Johannesen fyri sínar ódygdir sum leiðari, samstundis sum hann hevur tógvið stríð við innanhýsis andstøðingar sum Edmund Joensen og Magna Laksafoss, so er tað kortini hann, ið lær síðst, ið lær best.



Við síðsta val varð blást nýtt, akademiskt lív í Sjálvsstýrisflokkin. Hann fær kortini banasár í kanningini, meðan Miðflokkurin anir. Vit fáa at síggja, hvussu leikur fer. Spátt verður, at samgongan fellir, tá drotningin hevur vitjað – so er spurningurin, um tað fer at styrkja sambandsveingin enn meira...

**Samgongan fellur, tá drotningin hevur vitjað**

# Ein dreymur gongur út



Umsíðir gongur dreymurin hjá Annu Nygaard út, nú ein útgáva er í væntu í næstum. Fyrsta single av útgávuni, Walking on Fire, kemur væntandi 3. mai.

Anna og hennara framførsla av sanginum Whatever Happens hjá Michael Jackson, hevur verið nevnd sum størsta løtan av mongu live-framførslunum í X-Factorkappingini. Hennara farvæl úr kappingini gjørdi flest øll bilsin, tí hon var avgjørt millum favorittarnar at vinna kappingina. Tá Anna kom í vanda, mátti hennara egni dómari, Remee, fara úr upptøkuhølunum fyri at koma til eina niðurstøðu, ið var, at Anna mátti úr kappingini. Hetta fekk seinni BT at siga, at DR var farið heldur lættliga um í atkvøðuteljingini.

Men nú smílist eydnan aftur til Onnu. Meðan X-Factor var í Danmark, var altjóða viðurkendi framleiðarin Pete Smith – ið hevur arbeitt við Sting, Joe Cocker, Randy Crawford og Gary More, í Danmark. Hann arbeiddi saman við framleiðaranum Boe Larsen. Tá teir høvdu sæð og hoyrt Onnu á palli var leyst og liðugt. Og tá tey hittust vísti tað seg, at samstarvið riggaði stak væl og hetta sampakkaði við ta útgávuætlan, ið Anna altíð hevði havt hug at gera.

– Hetta er ein dreymur, ið gongur út, sigur Anna, sambært útgevarunum.

RecArt hevur skrivað langtíðarsáttmála við Onnu, og Jimmi Riise sigur m.a., at RecArt legði Onnu til merkis longu í undankappingini. Í løtuni arbeiður Anna við fullari ferð í Millfactory upptøkuhølunum við eini útgávu, ið sambært útgevarunum, verður eitt brak av eini útgávu, ið tónleikaliga fer at taka lurtarar á bóli. Fyrsta single kemur væntandi 3. mai, og Walking on Fire er bland av soul, latin og pop og ikki minst kemur orðið Diva til sín rætt.

*dagfinn@sosialurin.fo*



**Mismunur móti borgarum**

VAGNUR MICHELSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Andstøðan fær onki rúm í miðlunum**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 13



# Barnarímurnar aftur at fáa

Bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag hevur givið útaftur Barnarímurnar hjá Hans A. Djurhuus við myndprýðingunum hjá Elinborg Lützen. Í bókini eru 35 rímur og nótar til átjan teirra. Hetta eru rímur, sum hvørt mansbarn í Føroyum syngur: Kongaríkið í Bábýlon, Pápi mín, Karin og Hetta landið er títt.

Kendir tónleikarar, eitt nú Eivør og Annika Hoydal, hava givið fløgur út, har sangir hjá Hans Andreasi eru á.

Barnarímurnar eru uttan iva best kendi skaldskapurin hjá Hans A. Djurhuus. Tær komu út á fyrsta sinni í 1915. Hetta er sætta útgávan, og hevur bókin verið útseld í eina tíð. Flest fólk kenna gulu bókina við barnarímunum, men nú er guli liturin skiftur út – og er bókin í staðin ljósablá.

*eirikur@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo